almannastovan
www.almannastovan.fo



## DAGSTOVNURIN REIÐRIÐ søkir námsfrøðing

Søkt verður eftir einum námsfrøð-ingi til Dagstovnin Reiðrið á Saltnesi.

Starvið verður sett so skjótt sum gjørligt við einum tímatali um vikuna uppá 30 tímar.

Vit ynskja at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og kanst arbeiða sjálvstøðugt við at loysa uppgávur í samsvari við endamálið hjá stovninum og teimum málsetningum, sum stovnurin hevur.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hannu Juul, leiðara, á telefon 447003, ella á fartelelefon 215481.

Setanartreytir eru eftir avvarðandi fakfelag.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 3. juni 2008, kl. 12.00.

Send umsóknina til:
Almannastovan
Starvsfólkadeildin
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

Dagstovnurin Reiðrið er ein dagstovnur fyri fjølbrekað børn og ung undir 18 ár, har møguleiki eisini er fyri umlætting. Endamálið hjá Reiðrinum er at skapa eitt trygt grundarlag fyri børnini, at tey kenna seg væl, verða vird, eru við í sosalari samveru og fáa eitt mennandi tilboð, saman við neyðugu venjingunum. Reiðrið er ein dagstovnur undir Almannastovuni. Á stovninum eru 8 børn og ung.

KREA




Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari

# Spennandi útbúgvingar
## - eitt hav av vinnumøguleikum

**Nýtt skúlaár byrjar 4. august 2008.**

### Maskinmeistari
Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar, bæði á sjógvi og landi, líkamikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva elinnleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkurin. Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina er tvær ferðir um árið og byrjar aftur í aug. 2008.

### Maskinistur
Maskinistútbúgvingin gevur møguleikar fyri at vera maskinstjóri á flestu veiðuførum, sum fiska á føroyskum sjóøki. Útbúgvingin gevur t.d. eisini rætt til at vera maskinstjóri á skipum við maskinorku upp til 3000 kW í altjóða sigling. Útbúgvingin tekur 9 mánaðir.

Upptøka til maskinistútbúgvingina er eina ferð um árið og byrjar aftur í august 2008.

### Skipari
Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip, upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.

### Skipsførari
Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár; 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara. Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum høvum.

Upptøka til skipara- og skipsføraraútbúgvingarnar er tvær ferðir um árið og byrjar aftur í august 2008.

Maskinist- og maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

Hevur tú hug at gerast maskinistur, maskinmeistari, skipari ella skipsførari? Set teg so í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaði.

**Umsóknirnar skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. juni 2008.**
Umsóknarblað kann eisini heintast á heimasíðu okkara: www.vh.fo

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.



VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · vh@vh.fo · www.vh.fo

KREA